Vikuskiftis Sosialurin


# Aleqa bjóðar ikki av

Fyri nøkrum døgum síðani segði grønlendska landstingskvinnan Aleqa Hammond, at hon helt seg hava betri hegni til at leiða landsstýrið enn verandi landsstýrisformaðurin, Hans Enoksen. Tey bæði eru floksfelagar í flokkinum Siumut og dystaðust so seint sum í fjør um formanssessin í flokkinum. Tað vakti stóran ans, at Aleqa Hammaond aftur er til reiðar at bjóða Hans Enoksen av, men í gjár segði hon, at tað er eingin ósemja og heldur einki stríð um valdið í Siumut. Í einum tíðindaskrivi segði Aleqa Hammond, at hevði bara sagt, hvørji evni ein landsstýrisformaðu eigur at hava eftir hennara tykki. Tað var als ikki ein avbjóðing, segði hon.



# Samráðingaruppskotið orðað

Íslendska stjórnin hevur nú orðað uppskotið, sum hon fer at leggja fyri Altingið um at tingast við ES um limaskap í samveldinum.Uppskotið bleiv í dag almannakunngjørt á heimasíðuni hjá uttanríkisráðnum í Reykjavík. Frammanundan hevði stjórnin kunnað umboð fyri flokkarnar í Altinginum um innihaldið. Í uppskotinum stendur stutt, at Altingið samtykkir, at ríkisstjórnin søkir um limaskap í Evropasamveldinum, og at úrslitið verður lagt út til fólkaatkvøðu aftaná. Saman við uppskotinum er fylgiskjal, har tað millum annað verður staðfest, at íslendska fólkiið fær ta endaligu avgerðina at vraka ella at samtykkja sáttmála um limaskap í ES, tá hann er tøkur. Uppskot um umsókn og uppskot fólkaatkvøðu verða løgd fyri Altingið samstundis í vársetuni, stendur at enda í fylgiskjalinum.

## Samfelagið fer í hundarnar

- Eg sigi ikki, at tað er óføroyskt at vera samkyndur, tí so leingi tað eru føroyingar, sum eru samkyndir, so man tað vera føroyskt. Eg meini bara, at tað er óføroyskt at hava eitt sekulariserað samfelag, tí Føroyar hava altíð bygt á bíbilsku virðini, og tað hevur gjørt samfelagið til tað, tað er, sigur Bill Justinussen, tingmaður.

Tað, sum hann er so bangin fyri við 266b og líknandi lógum, er at vit koma í somu trupulleikar sum grannalondini hjá okkum, har tolsemi skapar trupulleikar, tí tey hava fingið so nógvar innflytarar í landið. Tað er tí tolsemi ikki skal vera ov stórt, sigur Bill Justinussen.

Hann staðfestir eisini, at einasta orsøkin til at homoseksuel hava fingið lógir at verja seg við, sum eftir hansara tykki eru óneyðugar, er tann ógvusliga lobbyisman, sum samkynd hava nýtt seinastu árini fyri at gera samkynd til ein serligan bólk.

- Tað er so øgiliga stórur munur á at vera littur og at vera samkyndur. Tú kanst onki gera við, at tú ert littur, tað er nakað, tú ert føddur til, sigur Bill Justinussen.

Hann leggur afturat, at tað, sum hevur gjørt føroyska samfelagið er so gott, er at kristnu grundvirðini eru so fest í samfelagið í bæði fólkaskúlalóg, hjá teimum ráðandi og so framvegis.

- Sjálvandi skulu vit løggeva við grund úr bibliuni, tí tað er ikki ein gongd leið at skilja religión og politikk, sigur Bill Justinussen.

# Talibanar stýra í Føroyum

**– Fundamentalistisku kreftirnar hava alt ov stórt vald í Føroyum, sigur Beinta Løwe Jacobsen, sum ikki vil finna seg í, at ávísir politikarar rópa tað óføroyskt at velja verja samkynd í lóggávu**

VERJA
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Beinta Løwe Jacobsen vil ikki finna seg í, at ávísir politikarar kalla tað at vera samkyndur at vera óføroyskt. Sambært henni sjálvari er hon journalistur, klaksvíkingur, føroyingur og skjótt eisini stjórnmálafrøðingur. – Tá mann tosar um, at ein ávísur bólkur av fólki er óføroyskur, so er tað bæði skelkandi og ræðandi, tí tað prógvar valdið hjá fundamentalistisku kreftunum í landinum, sigur hon

Nú revsilógin verður endurnýggjað er brenni aftur komið á bálið um tey samkyndu í Føroyum. Bill Justinussen hevur nevnt tað vera óføroyskt at verja samkyndur, meðan Karsten Hansen metir, at tað væl ber til at reinsa 266b, sum hann sjálvur orðar seg.

Hetta kann Beinta Løwe Jacobsen, sum millum annað er samkynd, ikki góðtaka.

- Ein politikari tosaði á tingsins røðarapalli um at reinsa 266b. Meinar hann veruliga, at mann vil reinsa ein ávísan bólk úr samfelagnum. Hetta er bæði skelkandi og ræðandi, tí tað vísir bara, hvussu bíblian ofta verður nýtt til lógarsmíð, heldur enn demokratiið, og at summir bólkar eru óvælkomnir til Føroyar, sigur Beinta Løwe Jacobsen.

Hon leggur afturat, at hon ætlar sær at flyta heim í heyst, tí hon vil ikki verða diskriminerað úr sínum landi.

Tað var Karsten Hansen, sum nevndi møguleikan at reinsa 266b fyri orðingina kynsliga orientering.



*Beinta Løve Jacobsen, sum býr í Danmark saman við unnustu síni, kemur til Føroyar í heyst, og vil ikki vera kallað óføroysk*

### Sambandsfólk føroyingar

Somuleiðis staðfestir hon turrisliga, at Alfred Olsen burdi verið fegin, nú okkurt danskt, og sostatt óføroyskt sær út at koma til landið.

- Løgfrøðiliga er ein føroyingur bara ein danskur ríkisborgari, sum býr í Føroyum, og tí dugi eg ikki at síggja, hvussu Bill Justinussen, ella nakar annar skal gera av, hvat er føroyskt og ikki. Eg haldi til dømis sambandsfólk vera líka føroysk sum tjóðveldisfólk, men kanska skuldi Alfred Olsen bara fegnast, at okkurt danskt eisini kom hendavegin, sigur hon.

### Kærleiki er óføroyskur

Heldur ikki dugir hon at skilja, at samkynd ikki skulu vera føroyingar, tí hon hevur altíð hildið, at kærleiki hevur verið rættiliga føroyskur.

Hon leggur afturat, at hóast tað kann sýnast lættari at stýra einum samfelagi, har øll eru eins, so er hetta ógjørligt, tí ongin er eins, og samkynd eru í Føroyum og fara at vera í Føroyum framyvir.

Ímillum hesi, sum Beinta Løwe Jacobsen hevur undir illgruna fyri at halda, at kærleiki er óføroyskur er Karsten Hansen, tá hann á tingsins røðarapalli tosaði um at reinsa 266b fyri kynsliga orientering, tí hon heldur ikki, at tað er rætt, at taka ávísar bólkar úr 266b.

- Tað er ræðandi, at ein tinglimur nýtir orðið reinsa í hesum førinum. Spurningurin er so, um tey eisini ætla at reinsa Føroyar fyri samkynd? Tað er skakandi at uppliva, at ein samfelagsbólkur er so illa sæddur av føroyskum politikarum, at lógir skulu reinsast, so tær ikki verja henda samfelagsbólk, metir hon.

### Fundamentalisman ræður

Somuleiðis er Beinta Løwe Jacobsen sannførd um, at tað, hon kallar, fundamentalistisku kreftirnar í landinum hava alt ov stórt vald.

- Vit síggja fer eftir fer, at politikarar ikki halda seg til veruleikan, at øll eru ymisk, men heldur miða eftir bíbliuni. Tað vísir seg eisini, at politikarar, sum vóru fyri 266b ikki vilja vera við at herða reglur um happing av somu bólkum, og at løgtingið við aðru viðgerð samtykti at taka 266b, stykki 2 burtur, og eisini samtykkir at strika orðingina "seksuel orientering" úr tveimun øðrum greinum, vísur enn einaðferð, at tað eru religiøsu fundamentalistisku kreftirnar, ið stýra løgtinginum og harvið eisini Føroyum, sigur hon.

Og leggur afturat, at vónandi fær hetta tingfólk at vakna og hugsa um, at tað eru menniskju tey hava við at gera, áðrenn føroyska samfelagið er "reinsa" fyri øll, ið ikki hóska inn í myndina hjá ávísum politikarum, vónar hon.

Í gjár varð við triðju viðgerð avgjørt, at 266b stykki 2, ikki skuldi við í dagføringarnar av revsilógini, og hinar broytingarnar vóru heldur ikki við, hóast broytingaruppskot kom fyri ting.

## Føroyingar háða ikki

Alfred Olsen hevur á tingi nevnt, at hann ikki kann taka undir við 266b og tí heldur ikki 266b stykki tvey, og at orsøkin til tað er, at tað er óføroyskt at happa.

- Eg verði ofta sagdur at gera føroyingar betri enn teir eru, men eg haldi ikki, at føroyinga plaga at háða og spotta hvønn annan, sigur Alfred Olsen, tingmaður. Tí heldur hann ikki nakra orsøk vera, at hava ein 266b við úrvaldum bólkum, tí hann heldur, at mannarættindasáttmálin, sum er galdandi fyri Evropa er ein nógv betri loysn.

## Vil hava lógina upp á pláss

Karsten Hansen er ikki í iva um, at tað er ein gongd leið at broyta 266b, so kynslig orientering ikki longur er partur av lógini.

- Tey samkyndu eru ikki øðrvísi enn nakar annar bólkur, sigur Karsten Hansen, og leggur afturat, at tað er tað hann meinar við, tá hann sigur, at mann burdi reinsa 266b.

Hann staðfestir somuleiðis, at tað hann ongantíð vil ganga við til at løggeva positivt fyri tingum, sum er í stríð við trúnna hjá honum.

- Eg havi onki ímóti samkyndum. Eg kenni fleiri skilafólk, sum eru samkynd, og sjálvandi skal tað vera pláss fyri øllum fólkum í Føroyum, men lógin skal vera galdandi fyri øll, og ikki bara ávísar bólkar, sigur hann.

Eisini greiðir hann frá, at hann ikki nýtir bibliuna at løggeva við, men at hon er meginreglan, hann roynir at liva við.